# Í STØÐUGUM VANDA FYRI ÁLOPI

**24 ÁRA** GAMLA **ANNA ELINBORGARDÓTTIR BERG** HEVUR SÍN **GERANDISDAG** ÍMILLUM DRÁPSMENN, **PÆDOFILAR**, TJÓVAR OG **BANDALIMIR**. HON LÆRIR TIL **FANGAVØRÐ** Í **VESTRE FÆNGSEL** Í KEYPMANNAHAVN, OG HÓAST FLEIRI AV **FANGUNUM** VILJA HENNI **ILT**, SO ER HON **IKKI** BANGIN. – EG HAVI ALTÍÐ **ALARMIN** HJÁ MÆR, OG UM EG VAR **BANGIN**, SO BURDI EG **FUNNIÐ** MÆR EITT ANNAÐ **STARV**, SIGUR HON **AVGJØRD**



**FONGSULSVITJAN**
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Vestre Fængsel er ikki eitt serliga innbjóðandi stað. Høgu, reyðu múrsteinsmúrarnir við píkatráði omaná og fleiri metra høgum hegni uttanum boða ikki frá gestablídni. Hóast tað, hevur fonglsið 445 gestir, sum vitja í longri og styttri tíð. 445 fólk, sum eru læst inni og sum missa ræðið á egnum lívi. Hetta er ein bygningur fullur av læstum, tungum og sverum hurðum, og tað luktar inniklemmað. Tað einasta, sum brýtur kvirruna á longu gongdunum við endaleysum røðum av læstum stálhurðum, er ljóðið av glintandi lyklatyssunum hjá fangavørðunum. Tað ljóðar kanska ikki sum eitt dreymastað fyri eina unga kvinnu, men Anna er komin á røttu hyll.

– Eg havi fantastiskar starvsfelagar, og eg havi eisini gott samband við summar av fangunum, vísir Anna á.

Hóast fleiri av fangunum eru mistonktir fyri álvarsom lógarbrot sum harðskap, narko, neyðtøku og dráp, so er tað ikki nakað, Anna hugsar um.

– Tey, sum sita her í Vestre Fængsel eru fólk, sum eru varðhaldsfongslað. Tey eru altso ikki dømd, men bíða eftir rættargongd. Og tað er ikki mín uppgáva at døma tey, tí tað skal dómstólurin gera. Eg skal syrgja fyri at hjálpa teimum her í fongslinum, greiðir Anna frá.

### Álopin av fanga

Anna arbeiðir á sonevnda sjúkrahúsinum í Vestre Fængsel. Hetta er ein fongsulsgongd við læknum og sjúkrasystrum, umframt fangavørðum.

> *Tey, sum sita her í Vestre Fængsel eru fólk, sum eru varðhaldsfongslað. Tað er ikki mín uppgáva at døma tey, tí tað skal dómstólurin gera*

– Hetta er einasta fongsulssjúkrahúsið í Danmark, so her koma fangar úr øllum landinum, sum eru komnir illa til skaða ella eru sjúkir. Deildin er býtt upp í tvær hæddir, onnur er fyri kroppsliga sjúk og hin er fyri sálarliga sjúk. Hetta er eisini ein av fáu gongdunum, har kvinnur og menn sita á somu gongd, greiðir Anna frá.

Meðan hinar gongdirnar eru býttar upp í til dømis konufólkadeild, ungdómsdeild, isolatiónsdeild og rockaradeild, so kemur Anna í samband við fangar av øllum deildum, og tað kann gott skapa trupulleikar. Tað bera smáu gulu seðlarnir á fleiri av klivahurðunum boð um.

– Ein gulur seðil á hurðini merkir, at vit ongantíð mugu fara inn til fangan einsamøll, tí tá verður fangin mettur at vera vandamikil, fortelur Anna.

Sjálv er hon einaferð álopin av einum fanga.

– Vit læra tíbetur sjálvforsvar í skúlanum, og hann var lítil, so eg kláraði at halda honum frá at gera mær nakran skaða, inntil aðrir fangavørðar komu til hjálpar. Vit hava altíð ein alarm á okkum, og tað tekur umleið 30 sekund at savna 40 fangavørðar av ymsu deildunum, sum sleppa øllum og koma rennandi til hjálpar. Summir eru sjálvandi skjótari til hjálpar enn aðrir.

Anna sigur, at hon tó ongantíð er bangin, hóast hon hevur upplivað nógvar harðligar fangar seinastu tvey árini. Hon heldur, at um hon skuldi verið bangin hvønn dag, mátti hon funnið sær eitt annað starv.

– Summir fangar klára bara ikki at síggja hendan bláa fangavørðsbúnan. Tey eru ill við skipanina, og okkara búni er vorðin eitt tekin um skipanina. Tí rætta tey alla sína vreiði ímóti okkum. Men tað eru bert nøkur fá. Fleiri eru eisini fitt, takksom og góð við okkum, og tey skilja, at vit ikki hava skyldina av, at tey eru endað her.

Anna sigur, at tað eisini hendir, at fangar leypa á hvønnannan, og tað kemur meiri enn so fyri, at tað eru stórir bardagar, sum fangavørðarnir skulu skilja sundur aftur.

– Vit hava verju; bæði skjøldur, kropsverju, piparspray og stavar, og um tað er heilt illa statt, so kunnu vit ringja eftir eini innsatsstyrki, sum kemur og ▶

## Ansa eftir lyklunum!

Tað eru nógvir lyklar í Vestre Fængsel. Hvørja vakt eru sera nógv starvsfólk í fongslinum, bæði fangavørðar, kontórfólk, læknar, sjúkrasystrar, prestar, sosialráðgevar og onnur, og tey hava øll hvør sítt lyklatyssi við nógvum lyklum í.

Anna greiðir frá, at um bara ein einasti lykil verður burtur, so steðgar øll skipanin upp, allir fangar skulu læsast inni og alt verður sett á pausu, inntil antin lykilin er funnin aftur, ella øll lásini eru skift. Tað kostar umleið eina millión at skifta bæði lás og lyklar, og harumframt missir tú starvið. Tí er tað regla nummar eitt, tá tú ert fangavørður, at ansa væl eftir lyklinum, sigur Anna Elinborgardóttir Berg.